# Gjáargarður: Náttúran er b

**Mong ferðafólk brúka bíðitíðina í Føroyum til at vitja við Gjógv. Her stendur Gjáargarður fyri teimum við opnum føvningi og bjóða teimum vælkomin innar. – Vit síggja, at fólk koma aftur og aftur til okkara. Tað skuldi verið besta reklaman, sigur dagligi leiðarin, Eirik Suni Danielsen**

GISTINGARHÚS
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Gjógv:** – We are hungry. Can we have something to eat?!

Tvey fremmandafólk eru júst komin inn í gongina á Gjáargarði – eitt tilkomið par úr USA.

Tey hava verið í Føroyum í nakrar dagar, hóast komið er út í september mánað. Henda dagin hava tey lagt leiðina norður til Gjáar.

Fyri teimum stendur ein blíður og fyrikomandi leiðari, Eirik Suni Danielsen. Hann biður tey bíða eitt lítið bil, inntil pláss er í matarhøllini.

Henda dagin er enn eitt skeið hildið í gistingarhúsinum, og hesi mugu sleppa at eta seg lidnan. Síðani verður gjørt pláss til gestirnar.

Hetta amerikanska parið er mestsum av tilvild komið til Føroyar. Tey ætlaðu at sleppa undan øllum ódnunum í USA, og hugsaðu í fyrsta umfari um at fara til Grønlands ella Íslands.

– Men so sóu vit á netinum, at til bar at flúgva til eitt stað sum kallaðist Føroyar. Og so fóru vit bara hagar, siga tey bæði. – This is a beautiful country!

Tíð er ikki til stórt meiri prát enn hetta, tí nú boðar verturin frá, at borðreitt er fyri amerikansku gestunum og tíðindafólkunum úr Havn.

Blíðskapinum bilar einki. Her verður ikki spurt, hvagani ein er ættaður. Her verður tikið ímóti fremmandafólk og heimafólki á sama hátt.



*Vakrari útsýnið enn tað av Gjáargarði, má ein leita leingi eftir – spyr bara Eirik Suna*

## Hugsaði seg væl um

Liðið er nú meiri enn eitt ár síðani Eirik Suni Danielsen saman við øðrum partnarum keyptu hetta kenda gistingarhúsið við Gjógv.

– Eg hevði sjálvur hug at keypa tað, tá eg sá at tað var til sølu. Men eg mátti hugsa meg væl um, áðrenn eg fór undir eitt slíkt tiltak.

– Eitt slíkt gistingarhús fæst jú ikki fyri einki, so tí hevði eg sjálvur ongan møguleika at keypa tað einsamallur. Eg mátti fáa onkrar aðrar við mær, sigur hann.

Tað eydnaðist honum at fáa fólk m.a. innan ferðavinnuna at trúgva uppá hansara ætlanir við Gjáargarði, og soleiðis skifti hesin bygningur eigara fyri 3,5 mió. kr.

Og 1. september í fjør var so dagurin, tá Eirik Suni gjørdist dagligur leiðari á Gjáargarði.



*Eirik Suni Danielsen hevur verið leiðari á Gjáargarði hetta seinasta árið. – Eitt strævið, men kortini spennandi ár, sigur hann*

## Strævið, men spennandi

Hetta fyrsta árið hevur verið eitt sera spennandi ár hjá Eirik Suna.

Umframt arbeiðið við at umbyggja gistingarhúsið, hevur eisini annað virksemið verið í húsinum at kalla alla tíðina.

– Jú, vit hava havt úr at gera. Her hava verið nógv ymisk fólk úr mongum ymiskum tjóðum.

– Og hetta hevur gjørt, at hóast tað mangan hevur verið strævið, so hevur tað kortini verið eitt sera spennandi ár, sigur hann, og veitir samstundis bygdarfólkinum eina stóra tøkk fyri móttøkuna tey hava fingið.

Um summarið vitja nógv fremmandafólk á Gjáargarði, men nú veturin stundar til, verða kundarnir av øðrum slagi.

## Ymiskir gestir

Nógvar fyritøkur velja nú at halda síni skeið á Gjáargarði, og annars eru tað familjur og áhugafeløg av ymiskum slagi sum gera brúk av rúmligu umstøðunum í húsinum, og har møguleiki eisini er fyri fullum kostarhaldi.

Her koma bæði barnagarðar, orkestur, bindiklubbar, kristnar samkomur og stovnar, og ítróttarfeløg. Uppaftur onnur velja at leggja leiðina til Gjáar, tá ein útferð í vøkru náttúru okkara skal gerast.

Til tess at gera umstøðurnar enn betri hjá áhugafeløgum og líknandi er samstarv fingið við bygdarhúsið, soleiðis at tey kunnu búgva á Gjáargarði, meðan venjingarnar fara fram í bygdarhúsinum.

Tí kann ein av og á hoyra hornblástur ella rokktónleik í bygdarhúsinum, ella ein sær sveittandi judo-fólk svala sær á uttanfyri, samstundis sum tey eta og sova í gistingarhúsinum.

Gjáargarður hevur eisini verið karmur um hátíðardagar. Her hava tískil verið hildin silvurbrúdleyp og

## Vánaligt ferðasamband

Eins og aðrastaðni kring landið, so er samferðslukervið av avgerandi týdning fyri menningina av einumhvørjum staði.

Soleiðis er eisini við Gjógv. Men her vísir tað seg sum at sambandið við umheimin kundi verið munandi betri.

Støðan er hon, at skalt tú til Gjáar við bussi, so mást tú fara úr Havnini kl. 6 á morgni og mást fara aftur tíðliga seinnapartin.

Hetta er sjálvandi ein ótolandi støða hjá mongum, men tað ringasta er kortini tað, at tú í fyrsta lagi mást boða frá, um tú skalt við bussinum seinnapartin.

Og í øðrum lagi liggur ferðaætlanin soleiðis, at als eingin túrur verður koyrdur til Gjáar leygardag og sunnudag.

– Fyri okkum hevði tað tí verið ynskiligt við munandi betri bussambandi.

– Tí tað átti ikki at verið nøkur orsøk hjá fólki at verða noydd at fara aftur til húsa tíðliga seinnapartin, sigur Eirik Suni.